Fyri 50 árum síðan:

# Manningar á Brandi Sigmundarson hittast

Nú 50 ár eru liðin síðan trolarin Brandur Sigmundarson kom til Føroyar tann 17. mars 1960, er ætlanin at manningarnar, sum hava siglt við trolaranum, hittast aftur til eina hugnaløtu á Hotel Føroyum fríggjadagin 12. mars. Hugnaløtan byrjar kl. 17, og borðhaldið verður kl. 19.




*Myndin er tikin á bryggjuni í Frederikshavn á grækarismessu tann 12. mars 1960. Á myndini eru Andrew Simonsen úr Sørvági og Edvard Ingibrigtsen úr Vestmanna.*

# Møtistevna í Odense



Árligi stevnudagurin í Odense verður leygardagin 13. mars. Á skránni er bíbliuundirvísing, sangur, prát og ikki at gloyma - ein góður biti. Andrew Berghamar kemur at hava tveir bíbliutímar undir heitinum „brot úr lívi Dávids".

Stevnan byrjar kl. 12 við einum bita og heldur áfram til einaferð út á kvøldið. Í ár verður stevnan hildin í Kristus kirkjuni, Klosterbakken 11, 5000 Odense C. Neyðugt er at tekna seg til stevnuna, so fyrireikararnir vita, hvussu nógv koma.

Tilmelding fer fram við at venda sær til Árni Helmsdal á e-mail: arnihelm@post.tele.dk ella á tlf. (+45) 30251373. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri bróðir og svágur, mammu- og pápabeiggi, ommu- og abbabeiggi, langommu- og langabbabeiggi

**Torkil Hovsdal**
Hovi

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Jónsvein Bech, prest, fyri góð og troystarrík orð, takk til organist, sangarar, kirkjutænarar og gravarar. Takk fyri heilsanir, kransar og blómur og til øll tey, sum lótu peningagávur til Hovs kirkju og Missiónshúsið.
Takk øll tit, sum hjálptu til við ervinum.
Ein serstøk tøkk til øll tykkum, sum vóru um hann hesi seinastu árini, tað veri seg heimahjálparar, heimasjúkrasystrar, eins væl og starvsfólk á sjúkrahúsinum og Eldrasambýlinum í Vági.

*Familjunnar vegna*
**Alica**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og stórt hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, abbi, verpápi, sonur, versonur, bróðir og svágur okkara

**Óli J. Berg**
Hvalba

so brádliga bleiv tikin frá okkum.

Tøkk til prestar fyri troystarrík orð í Landssjúkrahúskapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk til tykkum, sum bakaðu, og tykkum, sum hjálptu so væl til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Hvalbiar kirkju.
Hjartans tøkk til øll tykkum, sum vóru í kapellinum í Havn, og tykkum, sum sýndu Óla heiður við at fylgja honum til gravar.

*Familjunnar vegna*
**Hanna, Dánjal Jákup v. fam., Magnus v. fam. og Jens Pauli**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Iva Saloma Hansen**
Norðskála

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Emil Olsen, prest, organist og sangarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Norðskála kirkju.
Tøkk til starvsfólkini á Mørkini og á B6.
Tøkk til øll tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina og ervið, og tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ásbjørg, Magnus og Hans Petur**